# Mærsk leggur fleiri skip

Danska stórreiðaríið Mærsk Line sigur seg vera noytt at binda millum 10 og 15 av sínum meðalstóru bingjuskipum við bryggju. Eivind Kolding, sum er stjóri í Mærsk Line, sigur við donsk bløð, at avgerðin er ein avleiðing av altjóða fíggjarkreppuni. Hann sigur, at tað er minni farmur at flyta nú, og harafturat verða alt fleiri og fleiri bingjuskip sett í sigling. Soleiðis væntar Eivind Kolding, at bingjuskipini verða umleið 13 prosent fleiri í tali næsta ár enn í ár, hóast farmurin er minkandi. Mærsk Line hevur umleið 15 prosent av øllum bingjuflutningi í heiminum.







*- Vit hava gjørt eina ætlan, sum vit grunda á beinleiðis sparingar og upp á hækkaðar farmainntøkur, sum vit longu hava avtalað – og ikki upp á mettar eykainntøkur, sigur Petur Holm, stjóri á Smyril Line*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

við hotel- og cateringstarvsfólki.

Vetrarsiglingin verður Esbjerg, Tórshavn, Esbjerg.

- Hendan ferðaætlan fer at økja um inntøkurnar bæði á ferðafólka- og farmasíðuni, tí reglusemið verður betri, og tá hædd verður tikin fyri, at Esbjerg er eini betri havn at sigla til, sigur Petur Holm.

Sparingarnar í 2009 verða:

Hotelstarvsfólk ……… 5,0 mió. kr.

Noregssigling ……13,6 mió. kr.

Scrabstersigling …… 0,5 mió. kr.

Tilsamans …19,1 mió. kr.

Lækkandi oljuprísur gevur eisini Smyril Line nakrar sparingar. Felagið brúkar fyri 51 milliónir krónur í olju í ár, men roknar við at brúka fyri 36,8 milliónir krónur í komandi ári. Smyril Line ger avtalu við oljufelagið um ein fastan prís, og sambært hesum eru sparingar nú 14,2 milliónir krónur, men um oljuprísurin alsamt lækkar, kunnu hesar sparingar verða enn størri.

Sølan á norska marknaðinum er 14,9 milliónir krónur. Her leggur Smyril Line dent á, at einasti møguleiki hjá norðmonnum at ferðast við bili til Føroyar og Ísland framvegis er Norrøna.

Smyril Line roknar við, at við nýggju ferðaætlanini fer ferðafólkatalið at økjast 5% og at hetta gevur ein vinning upp á 10 milliónir krónur.

Broytingin í FAS skipanini er eisini sparing hjá Smyril Line upp tríggjar milliónir krónur.

- Nýggja ferðaætlanin hjá okkum er væl móttikin hjá okkara umboðum, bæði í Føroyum og uttanlands. Vit hava nú møguleika at geva fólki tað, sum tey bíða um, nú vit kunnu nøkta eftirspurningin á rutuni millum Føroyar og Danmark og av meginlandinum til Føroya og Íslands, sigur Petur Holm at enda.




*Talvan vísir á hvørjum rutum fólk ferðast við Norrønu. Nógv tann best umtókta farleiðin er millum Føroyar og Danmark*

| | DKK NETSALE | PAX-LEGS |
|---|---|---|
| DENMARK-FAROES V.V. | 28,109,405 | 59,720 |
| DENMARK-ICELAND V.V. | 41,633,134 | 55,842 |
| DENMARK-NORWAY V.V. | 2,167,953 | 15,614 |
| DENMARK-SHETLAND V.V. | 458,149 | 489 |
| DENMARK-SCOTLAND V.V. | 158,616 | 292 |
| FAROES-ICELAND V.V. | 2,590,933 | 4,433 |
| FAROES-NORWAY V.V. | 7,973,472 | 19,685 |
| FAROES-SCOTLAND V.V. | 2,606,507 | 5,277 |
| FAROES-SHETLAND V.V. | 458,696 | 966 |
| ICELAND-NORWAY V.V. | 10,683,997 | 20,571 |
| ICELAND-SHETLAND V.V. | 794,720 | 1,368 |
| ICELAND-SCOTLAND V.V. | 2,054,675 | 2,817 |
| NORWAY-SHETLAND V.V. | 282,235 | 739 |
| NORWAY-SCOTLAND V.V. | 1,042,567 | 1,400 |

*Á kortinum sæst, hvussu stórir ymsu marknaðirnir hjá Smyril Line eru. Eftir tann føroyska marknaðin er tann týski nógv tann størsti*

